# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*22. oktober fekk Óli Normann í Lon, sum býr á Húsum, eina lítla systur. Hon vigaði 4100 gram og var 56 cm long. Foreldur teirra eita Jona og Eystan í Lon.*

30. oktober fingu Sanvør Hansen og Gunnar Joensen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3800 gr.

30. oktober fingu Anni og Jóhan S. Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4100 gr.

31. oktober fingu Mirjam og Pól Frits Høj, Strendur, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3485 gr.

31. oktober fingu Súsanna Debes og Herleif Hammer, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

2. november fingu Sóleyð Holm og Bogi K. Henriksen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4330 gr.

4. november fingu Sunneva Thorsteinsson og Niels Hovgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4120 gr.

4. november fingu Anita og Bjarti Matras, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4125 gr.

5. november fingu Unnur Sjúrðardóttir Fonn og Theodor Fonn, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2800 gr.

5. november fingu Heidi B. Hansson og Ronnie Korsager Davidsen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3500 gr.

## Andlát

30. oktober
John við Neyst, Hvalba, 74 ár
Poul í Skorini, ættaður av Eiði búsitandi í Havn, 85 ár
31. oktober
Rakul Rasmussen av Strondum, 83 ár
Gunnvá Skårup, fødd í Havn, 69 ár
2. november
Børge Henriksen, fyrrverandi bakari í Vági, 77 ár
Selma Kjærbo, fødd Petersen, Fuglafirði,81 ár
3. november
Sámuel Bringsberg, vanliga nevndur Sam, ættaður úr Árnafirði, búsitandi í Klaksvík, 81 ár.
4. november
Sigurð Thomassen, Miðvágur, 84 ár
Gunnar Berg, Hoyvík, 31 ár
5. november
Páll Poulsen,ættaður í Klaksvík búsitandi í Kollafirði, 56 ár
Elenora Joensen,fødd Garðsholm, Miðvági, 64 ár
John Thomsen, Klaksvík ættaður úr Porkeri, 92 ár

## 35 ár síðani P. M. Dam doyði



Í dag eru liðin 35 ár síðani, at Petur Mohr Dam, løgmaður, doyði. Hann varð føddur í Skopun 11. august í 1898, og var hann júst vorðin sjeyti, tá hann doyði - miðskeiðis í øðrum løgmansskeiði sínum. Petur Mohr Dam var sonur Óla Christian Dam, handilsmann, sum var úr Kollafirði, og Sáru Mariu, f. Olsen, av Heygum í Vestmanna.

Petur Mohr Dam kom á ting, tá Javnaðarflokkurin fyrstu ferð fekk umboðan á tingi í 1928. Hann var formaður floksins mestu tíðina hesi 40 árini.

Størstu avrikini eftir Petur Mohr Dam munnu verða heimastýrislógin, sum kom í gildi í 1948 og almannalógirnar, sum komu í gildi í 1959. Tað vóru Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum samráddust um og samtyktu heimastýrislógina – og sum skipaðu fyrsta landsstýrið í 1948 undir leiðslu av Andras Samuelsen, Føroya fyrsta løgmanni. Í 1950 skipaðu Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin landsstýri, og vóru Petur Mohr Dam og Javnaðarflokkurin tá í andstøðu í átta ár, til flokkurin aftur kom í landsins stýri sum størsti flokkur í 1958 – aftur saman við Sjálvstýrisflokkinum og Sambandsflokkinum. Tað vóru lyfti um sosialu lógirnar, eitt nú fólkapensjónina, ið gav Javnaðarflokkinum vind í seglini, og komu tær fyrstu í gildi í 1959.

Eftir at sonevnda sjálvstýrislandsstýrið við Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, hevði sitið frá 1963-67, skipaði Javnaðarflokkurin aftur landsstýri eftir valið í november í 1966 við Petur Mohr Dam sum løgmanni – aftur saman við Sjálvstýrisflokkinum og Sambandsflokkinum.

Í miðjum valskeiði andaðist Petur Mohr Dam hin 8. november í 1968.

## Agnar Nielsen 75 ár



Hósdagin 6. november fylti Agnar Nielsen í Vestmanna 75 ár. Agnar er vestmenningur, sonur Sannu Aagaard úr Leirvík og Jens Nielsen úr Vestmanna.

Hann bleiv útbúgvin skipstimburmaður í 1949 og var bedingsmeistari á skipasmiðjuni í Vestmanna frá 1958-65 og stjóri á Vestmanna Skipasmiðju frá 1972-81. Eisini arbeiddi hann sum kavari frá 1966-72.

Agnar var løgtingsmaður í 20 ár, hann umboðaði sambandsflokkin í Norðurstreymoy og var løgtingsformaður frá 1978-79 og frá 1989-90. Hann var formaður í nevndini fyri Tryggingarsambandið Føroyar frá 1980-84. Hann sat í Føroya kirkjustjórn í 25 ár og sum umboðsmaður í Norðurlandaráðnum í 10 ár.

Hann hevur eisini verið virkin í kirkju- og missiónsarbeiðinum í Vestmanna, og sat hann í mong ár í stýrinum fyri missiónshúsið í bygdini, var limur í kirkjuráðnum og deknur.

Agnar hevur eisini verið virkin innan Blá Kross frá ungum árum av, hann í mong ár formaður í landsnevndini hjá Bláa Krossi í Føroyum.

Agnar giftist við Lilly, f. Poulsen, úr Vági, tey fingu 9 børn. Lilly doyði fyri seks árum síðan. Agnar giftist uppaftur við Claru Borgarlið úr Havn, sum doyði nú í september.






NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jensia Christensen, Fredericia, 80 ár



8. november fyllir Jensia Christensen í Fredericia 80 ár. Jensia er fødd í Havn. 8. november 1923. Foreldrini vóru Mourits E. Jacobsen úr Kaldbak og Elisabeth, f. Poulsen, av Eiði.

Jensia giftist 14. desember 1948 í Havn við Simon Christensen frá Sønder Onsild í Danmark. Tey búðu í Føroyum til 1952, tá fluttu tey til Dalegade 24 í Fredericia, har tey framvegis búgva. Tey eiga tvey børn, fimm ommu- og abbabørn og trý langommu- og langabbabørn.

Meðan tey búðu í Føroyum, spældi Simon fótbólt við HB. Hann verður 80 ár 9. januar komandi ár.



## Rúna Sivertsen á ting

31. oktober 2003 tók Rúna Sivertsen sæti á tingi fyri Jógvan við Keldu, sum er í farloyvi.

Rúna Sivertsen er varatingmaður hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum.

Hetta er aðru ferð at Rúna tekur sæti í tingi í hesum valskeiðinum. Frá 1996 til 2002 sat hon á tingi fyri Anfinn Kallsberg.

Óli Hans Hammer Olsen:

## Prógv sum Executive MBA



25. oktober 2003 tók Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, búsitandi í Streymnesi, prógv sum Executive MBA í shipping og logistik frá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Óli Hans er 46 ára gamal, ættaður í Syðrugøtu. Hann er útbúgvin skipsførari, hevur siglt úti í fleiri ár og arbeitt í oljuvinnuni.

Hann arbeiddi í Mentamálaráðnum, áðrenn hann bleiv settur í starv sum stjóri á Skipaeftirlitinum 1. desember 2001.

Útbúgvingin sum Executive MBA hevur tikið honum 25 mánaðir. Handilsháskúlin í Keypmannahavn skipar fyri hesi útbúgving. Óli Hans hevur hesa tíðina ferðast í nógvum ymiskum norðurlendskum og evropeiskum býum til fyrilestrar. Útbúgvingin er bygd upp í ellivu modulum.

Projektið hjá honum var um "Altjóða skipaskrásetíng í Føroyum".

Óli Hans er giftur við Katrin, f. Nielsen, tey búgva í Streymnesi og eiga børnini: Elin Mariu og Andras.

## Dagurin

**8. november. Claudius,** deyður umleið ár 300. Steinhøggari, sum saman við fýra øðrum steinhøggarum altíð risti kross í tey arbeiði, hann legði úr hondum. Tá ið hann og felagar hansara noktaðu fyri at høgga myndir av skurðgudum, læt keisarin Diocletianus teir taka av døgum.

**9. november. Teodor,** deyður í umleið ár 300. Ungur rómverskur hermaður, sum var vorðin kristin. Hóast tær atsóknir, Diocletianus keisari gjørdi at teimum kristnu, helt hann fast við trúnna. Setti eld á eitt skurðgudatempul í Róm og varð tikin av døgum.

Grikst navn, ið merkis *Guðs gáva.*

**10. november. Luther.** Sjálvandi ikki komin í álmanakkarnar sum halgimenni, men dagurin er í luthersku kirkjuni settur sum minningardagur hansara. Hann varð borin í heim 10. november 1483 í Eisleben í Týsklandi.

## Ole Wich 50 ár



Týsdagin 4. november fylti Ole Wich í Havn 50 ár. Ole er dani, kemur frá Fyn og er útbúgvin grafikari.

Hann var fyrstu ferð í Føroyum sum marinari við verjuskipinum Hvidbjørnen í 1973. Seinni, í 1980, búsettist hann í Føroyum. Fyrstu trý árini arbeiddi hann sum myndamaður hjá Føroya Fornminnisavni. Frá 1983 til 1996 hevði hann teknistovuna, Kubus Teknistovan, saman við Ole Jensen, arkitekti.

Ole er giftur við Sanne Storm, musikterapeutur á Landssjúkrahúsinum, sum eisini er donsk. Tey eiga tveir synir: Peter, 14 ár, og Anton, 9 ár. Frá 1996 til 2002 búði familjan í Danmark.

Ole hevur sitið í nevndini hjá Tutl og í Filmsfelagnum. Hann hevur havt sermerktar listaframsýningar í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum við dansi, tónleiki og myndum og gjørt konseptið til tónleikaverkið "Brøytingar". Hann hevur givið út yrkingasavnið "Ophav" á forlagnum Fannir í 1996.

Yrkingasavnið lýsti viðurskifti millum Danmark og Føroyar og hvussu tað var og enn er, at verða dani í Føroyum.

Ole Wich starvast í dag á Team 85 í Havn.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.